# Marni gjørdi munin



**BEINT Í ELDIN**

*Marni Djurhuus var tveittur beint í eldin móti FC Suðuroy og spældi sum ein brandur. Í gjár gjørdi hann stóran mun í skirvisligu verjuni hjá EB/Streymi, har hann millum annað tók sær væl av framherjanum hjá FC Suðuroy, Obi Charles*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

**VODAFONEDEILDIN Sundalagsmenn eru við at finna tær góðu taktirnar og flótandi smáspælið fram aftur. Men móti FC Suðuroy manglaði enn bit í álopinum, og í skirvisligu verjuni var eingin ivi um, at heimkomni Marni Djurhuus gjørdi munin**

Rógvi Nybo

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 2 |
| FC Suðuroy | 0 |

Hóast Arnbjørn Hansen í gjár átti avgerandi fótin í dystinum millum felagsliðini bæði úr Sundalagnum og Suðuroynni, so vóru tað aðrir menn, sum gjørdi størra inntrykkið á áskoðararnar við Margáir. Eitt nú Marni Djurhuus, sum aftur var at síggja á liðnum hjá EB/Streymi í gjár.

Kollfirðingurin er annars farin til Danmarkar í lestrarørindum, men spælaraloyvi lá eftir, so hann var til reiðar, tá EB/Streymur ringdi eftir honum, nú heldur tunnligt er í verjupartinum. Marni hevur vant við Vanløse, meðan hann hevur verið niðri, og hann tóktist árvakin frá byrjan til enda.

Í dystinum við Margáir hevði EB/Streymur bóltin nógv mest og stóð fyri tí allarmesta. Men meðan álopstaktirnar eru heilt góðar, og nógv av tí vakra smáspælinum, sum fyrr hevur eyðkent felagsliðið, er aftur at hóma, so restar enn tað allarseinasta í.

Nógvu kjansirnir vórðu ikki umsettir til mál, og høvdu fleiri av tryggu spælarunum sum Arnbjørn Hansen, Hans Pauli Hansen og Sorin Anghel góðar støður, har teir vanliga skora – men sum hesa ferð fóru antin beint á málmannin ella upp um mál.

### Luktaði eina løtu

FC Suðuroy hevur higartil í ár staðið seg væl. Kappingarárið mundi byrjað við sensatiónini í Gundadali móti meistarunum, men sigur glapp í yvirtíðini. Á heimavølli í Vági var tað síðani FC Suðuroy, sum í yvirtíðini fekk útjavnandi málið ímóti NSÍ. Tí »luktaði« tað eina løtu til fyrimun hjá FC Suðuroy. Men bert eina løtu.

Uppleggið hjá FC Suðuroy var at royna at standa móti trýstinum frá EB/Streymi og síðani skora upp á skjótálop. Jón Krosslá Poulsen hjá FC Suðuroy ásannar eisini, at høvdu teir fingið eitt mál upp á teir kjansir, teir høvdu í fyrra hálvleiki, kundi leikur verið øðrvísi.

– Ja, eg hevði sjálvur ein heilt góðan kjans har, sum eg í dag ikki fái inn. Hevði eg skorað tá, hevði tað nokk verið øðrvísi, sigur Jón Krosslá Poulsen.

Sum tíðin rann í seinna hálvleiki, gekk orkan undan hjá FC Suðuroy, og EB/Streymur fekk trýst seg fram til alsamt fleiri kjansir. Tað skuldi eisini verið løgið, um ikki okkurt av tí góða smáspælinum gav úrslit, og var tað júst gott smáspæl frá millum annað Hans Paula Samuelsen, Alex Dos Santos, Sorin Anghel og Arnbjørn Djurhuus, ið førdi til bæði málini hjá EB/Streymi.

*rogvi@sosialurin.fo*

## Vit eru ikki ónøgdir

**VODAFONEDEILDIN Teir í FC Suðuroy kundu hugsað sær at verið meira effektivir, men eru kortini nøgdir við kappingarbyrjanina**

Rógvi Nybo

Uttan at nakar skaraði framúr, royndu allir hjá FC Suðuroy at stríðast fyri sínari søk. Men størsta partin av dystinum runnu suðuroyingarnir aftaná og sundalagsmenn undan. Jón Krosslá Poulsen hjá FC Suðuroy er als ikki so ónøgdur kortini:

– Nei, vit eru ikki ónøgdir. EB/Streymur trýstir okkum allan dystin, og vit koma ongantíð ordiliga upp at koyra, sigur hann.

Jón Krosslá Poulsen ásannar, at høvdu teir sjálvir verið meira effektivir og tikið av sínum kjansum meðan EB/Streymur enn brendi sínar, so hevði dysturin verið øðrvísi. Men tá tað kemur til stykkis, hava teir ikki so nógv at ilskast inn á.

– EB/Streymur hevur nógvar góðar spælarar, og í dag fáa vit ongantíð frið. Teir trýsta okkum alla somlu tíðina, og samanumtikið er hetta nokk ein uppiborðin sigur.

Jón Krosslá Poulsen sigur, at meðan teir hava havt eina rímuliga góða byrjan upp á árið, fór tað altíð at verða ringt at vinna henda dystin. Hann leggur tó afturat, at tá teir komandi vikuskifti taka ímóti B68, er tað eitt krav, at teir tá taka øll trý stigini.

*rogvi@sosialurin.fo*